# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

26. mars fingu Ann Zachariassen, Hvannasundi, og Frank Skorastein, Leirvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

28. mars fingu Steinvør Olsen og Tóroddur Niclasen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3775 gr.

28. mars fingu Joana Valborg Bjarnastein og Gunnar Restorff , Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3100 gr.

29. mars fingu Marjun og Dan Kjelnæs, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4300 gr.

29. mars fingu Beinta Johnsdóttir Danielsen, Tórshavn, og Petur Pauli Petersen, Sandi, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3950 gr.

30. mars fingu Ata Reinert úr Kaldbak, og Kærleis Danielsen úr Vági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr. Tey búgva í Keypmannahavn.

30. mars fingu Anna Sofía og Henrik Mellemgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr. Dótturin eitur Tina.

1. apríl fingu Annika Olsen og Niels Winther Poulsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4250 gr.

2. apríl fingu Ebba Parker Øre og Bogi Petursson Nielsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3550 gr.

2. apríl fingu Katrin í Gerðinum Olsen og Eivind Olsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3450 gr.

2. apríl fingu Marjun Sólgerð Haraldsen og Torkil Davidsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3100 gr.

## Andlát

26. mars
Hjalmar Guttesen, Tórshavn, 54 ár.

27. mars
Alma Joensen í Sumba, 75 ár.
Ebba Wore, fødd Gregersen, ættað úr Syðrugøtu, 87 ár

28. mars
Sunnvá Johansen, Miðvág, 68 ár.

30. mars
Erling Nielsen, ættaður av Sandi, búsitandi á Eiði, 78 ár.
Hjalmar Sílbjørg, Klaksvík, ættaður úr Kunoy, 75 ár.
Erling Nielsen, ættaður av Sandi, bús. á Eiði

31. mars
Jacob Adrian Hansen, í Leirvík, 81 ár.

01.apríl
Ásmund Davidsen, í Elduvík, 41 ár.
01. apríl
Amalia Jacobsen, á Toftum, 89 ár.

# Sp/f SRI – nýggjur málingahandil




Mikudagin 26. lat Sri Sivananthan Jacobsen upp ein nýggjur málingahandil í Lucas Debesargøtu 6 í Havn. Sri, ið er ættaður úr Sri Lanka, kom til Føroyar fyrstu ferð í 1989. Eftir at hava búð 12 ár í Danmark, kom hann aftur til Føroya í 2001. Í Danmark arbeiddi hann í 9 ár hjá málingaverksmiðjuni Dyrup, har hann fekk útbúgving sum procesoperatørur við litum og lakki sum sergrein. Handilin selur máling av merkjunum Dyrup´s, Gori og Bondex. Umframt tað hevur handilin eisini ta nýggjastu Flora málingina frá Dyrup´s, sum einans fæst har. Annars er alt tað vanliga til málingabranchuna at fáa hjá Sp/f SRI, sum heldur til í hølunuum, har Daddan fyrr seldi barnaklæðir, yvir av bilstøðini Auto.

## Enn ein útskifting í Framtaksgrunninum

Nývaldi Carl á Lag hevur sagt seg úr nevndini fyri Framtaksgrunnin, tí ivi er sáddur um gegni. Í hansara stað kemur Hans Andrias Joensen, stjóri í Thor

– Tað hevur verið mótmælt frá pørtum av vinnuni, og eg føli eisini okkurt frá politiskari síðu. Eg havi ongan hug at draga mín persón, mína familju ella mítt virksemi ígjøgnum rumbul, og tí havi eg sagt meg úr nevndini.

Tað sigur Carl á Lag, nývaldi limurin í nevndini fyri Framtaksgrunnin, sum longu hevur biðið Bjarna Djurholm, landsstýrismann, loyst seg úr nevndini

Bjarni Djurholm hevur tikið støðuna til eftirtektar og hevur valt Hans Andrias Joensen úr Thor í Hósvík í nevndina í staðin.

Carl á Lag er farin úr nevndini, tí dagliga arbeiði hansara fyri P/F SNG kann seta hann í eina tvístøðu, tá viðurskifti hjá feløgum í Framtaksgrunninum skulu viðgerast, sigur hann í brævi til landsstýrismannin.

Sostatt fekk Carl á Lag bert fáar dagar í nevndini fyri Framtaksgrunnin. Hann varð valdur í nevndina fyri Niels Winther Poulsen, sum eisini hevur sagt seg úr nevndini eftir bert einum ári sum formaður, tí ivi varð sáddur um hansara gegni.

Carl á Lag er stjóri í altjóða fyritøkuni SN Global, sum hevur evropeiskt høvuðssæti í Føroyum. SNG fæst við fiskasølu, og tí hava fleiri sett spurnartekn við, um tað er hóskandi, tá ein av høvuðsognunum hjá Framtaksgrunnurin er Faroe Seafood. Sum skilst er Fiskasølan millum teirra, ið hava víst sína ónøgd.

**Ingi Rasmussen**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Olli í Lágabø 80 ár



6. apríl fyllir Olli í Lágabø 80 ár. Olli er føddur og uppvaksin í Sørvági, har hann lærdi til skómakara. Hann flutti seinni suður til Vágs, har hann byrjaði sum skósmiðjur 29. februar 1948. Olli arbeiddi sum skósmiðjur og vulkaniseraði gummiskógvar. Seinni fór hann undir at vulkanisera bildekk og bobbensar til skip. Hann bygdi bil- og vulkaniseringsverkstaðin Auto Vulk í Vági. Umframt arbeiðið við verkstaðinum var hann koyrilærari og koyrdi hýruvogn, og hevði hann fasta koyring við lækna og ljósmóðir. Miðskeiðis í 80-unum flutti hann til Havnar. Í Havn arbeiddi hann sum koyrilærari og hevði egnan koyriskúla. Olli hevur verið ein góður maður, pápi, abbi og langabbi. Hann eigur 5 børn og 30 abba og langabbabørn.

## Finnleif Durhuus 60 ár



2. apríl fylti Finnleif Durhuus í Havn 60 ár. Finnleif er føddur og uppvaksin á Sandi. Hann kom til Havnar í 1959 og fór í læru sum timburmaður hjá Peturi í Gong byggimeistara. Hann arbeiddi sum timburmaður til 1966, tá hann fór til Danmarkar at lesa til byggifrøðing. Hann kom heim aftur í 1969 og byrjaði 15. apríl hjá Landsverkfrøðinginum. Í 1973 bleiv hann leiðari á vega- og umsitingardeildini hjá Landsverkfrøðinginum. Í dag er hann eisini leiðari á ferðsludeildini og á plan- og projekteringsdeildini. Í hesum arbeiði er hann komin nógv runt í landinum og havt við nógv ymisk fólk at gera. Finnleif hevur verið í sangkórinum í Ebenezer síðan 1960, og var hann ein av teimum fýra, sum mannaðu kvertettina Sangbrøður, ið góvu sína fyrstu plátu út til jólar í 1966. Teir góvu 3 plátur út í 60-unm og eina endurútgávu til jólar í 2002. Finnleif er giftur við Jóhonnu Mariu, f. Samuelsen, og eiga tey børnini Mikkjal, Kára og Ingunn.

## Marianna Dam 60 ár



Leygardagin 5. apríl verður Marianna Dam í Havn 60 ár. Marianna er ein havnarmynd, hon hevur starvast í ymsum handlum í Havnini størsta partin av sínum vaksna lívi. Vit minnast hana hjá Jóan Jakku, í Sápuhúsinum, hjá Sunnevu Gram, í Samvinnufelagnum og til endans í Madan L. Nú er handilsdiskurin skiftur út við kokkagrýturnar, og kundarnir skiftir út við vøggustovubørn. Marianna starvast nú í køkinum á Vøggustovuni við Velbastaðvegin, og um kvøldarnar vaskar hon á Skipafelagnum. Marianna hevur verið og er ein álitiskvinna á abeiðsplássinum. Hon er gift við Árna Dam, og eiga tey børnini: Mathildu, Janus og Niels Una.

## 90 ár

Leygardagin 5. apríl verður Sanna R. Danielsen, vanliga nevnd Sanna á Høvdanum, á Strondum 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Eysturoyar Røktar & Ellisheimi frá kl. 15-18.

## 80 ár

Í dag verður Olli í Lágabø, koyrilærari, 80 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Hafnia fyri innbodnum.

## Brúdleyp

Sunnudagin 6. apríl kl. 9.00 giftast í Dómkirkjuni Beinta D. Bærentsen og M. Frífinn Nolsøe. Eftir vígsluna verður brunch á Hotel Føroyum fyri teimum, ið hava teknað seg.

## Prógv

31. mars fekk Oddvør Davidsen, Sandavági, prógv sum sosial- og sunnheitsassistentur á Sosial- og sunnheitsskúlanum í Skive.

## Elsa Olsen 85 ár



Tann 28. mars fylti Elsa Olsen í Klaksvík 85 ár. Hon er dóttir Cathrinu Christiansen av Kirkju og Michael Lamhauge úr Lamba. Cathrina og Michael bygdu fast í sunnara enda í Trøllagili á Uppsølum í Klaksvík, og har kom Elsa at slíta sínar barnaskógvar.

Elsa er væl fyri, og hvønn morgun ger hon kaffi til tey, sum detta inn á gólvið. Og hendir tað seg ein morgun, at eingin kemur, so ringir hon eftir onkrum av ommubørnum sínum.

Í 1939 giftist Elsa við Hans Olsen av Tvøroyri. Tey fingu børnini, Steinvør, Michael, Onnu Elisabeth, Katrin og Sørmund.

Elsa sigur sjálv, at hon er signað við trimum gávum, góðum matarlysti, góðum svøvngávum og børnum og ommubørnum, sum eru sera góð við hana.

rs

## Dagurin

5. apríl. Irene, deyð umleið ár 300. Tikin av døgum saman við tveimum systrum. Navnið merkir friður.

6. apríl. Sixtus, deyður í 126. Hann var Pávi.

7. apríl. Egesippus, deyður umleið ár 180. Jødi i Róm, sum gjørdist kristin.

## Áki á vikuskiftisvaktini



Sosialurin er farin undir at hava fasta tíðindavakt í vikuskiftinum. Hetta vikuskiftið er tað Áki Bertholdsen í Sandvík, sum er á brúnni. Tey, sum hava tíðindi til blaðið, skipa fyri fundum ol. kunnu venda sær til Áka á telefon 375304 og á telduposti aki@sosialurin.fo